**Úrskurður Ítróttadómstólsins**

viðvíkjandi kæru frá kappróðrarfelagnum Havørnin/SÍF

um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya

Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru frá Havørnini hjá Sandavágs Ítróttafelag, róðrardeild, (SÍF), dagfest 9. august 2025 um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfestur 4. august 2025, í sambandi við, at Fiskurin er FM-vinnari 2025 í barnaróðri fyri dreingir.

Í viðgerðini í Ítróttadómstólinum hava 5 nevndarlimir luttikið: Anna Rein, formaður, Jóhan Lamhauge, Magnus Dam, Sissal K. Kristiansen og Heðin Joensen nevndarlimir.

Semja er millum limirnir í Ítróttadómstólinum um, at allir limir eru gegnigir til at viðgera kæruna.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

Grundarlagið undir viðgerðini av kæruni:

- Kæra frá Havørnin/SÍF, barnamanning dreingir send í telduposti 9. august 2025
- Niðurstøða frá starvsnevndini í Róðrarsambandi Føroya viðvíkjandi fyrispurningi um FM-vinnara hjá 5 MF barnaróður dreingir
- Avgerðin hjá Dómsnevndini í Róðrarsambandi Føroya, dagfest 4. august 2025
- Lógir og reglur Róðrarsambands Føroya
- Lógir og reglur Ítróttasambands Føroya

**Málsgongd / Málslýsing**

Kært verður um, at Fiskurin vann FM heitið 2025 í barnaróður fyri dreingir. Niðurstøðan byggir sambært kæraranum á eina skeiva og ólógliga tulking av § 46, stk. 2 í lóg um kappingarreglur hjá Róðrarsambandi Føroya, har eisini § 46, stk. 3 varð drigin inn.

Kærarin vil hava Ítróttadómstól ÍSF´s at staðfesta; at § 46, stk. 2 og stk. 3 beinleiðis geva Havørnini rætt at verða FM-vinnarar eftir Vestanstevnu; at Vestanstevna var síðsti FM-róður hjá Havørnini í 2025; at RSF hevur tulkað reglurnar skeivt og ólógliga kravt luttøku á Ólavsøku og at onki fordømi finst fyri at tulka reglurnar á hendan hátt í barnaróðri.

Tann 9. august 2025 kærdi Havørnin/SÍF avgerðina hjá Dómsnevndini til Ítróttadómstól ÍSF. Saman við kæruni varð avrit sent av úrskurðinum hjá starvsnevndini og dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya viðvíkjandi FM heitið 2025 í barnaróðrinum fyri dreingir.

**Ítróttadómstólurin skal viðmerkja:**

Ítróttadómstólurin er komin til ta niðurstøðu, at hann er samdur um at staðfesta úrskurðin hjá Dómsnevndini í Róðrarsamband Føroya við teirri grundgeving, "at Fiskurin er rætti FM vinnarin í barnaróðri, við tað at teir vunnu á Ólavsøku, komu upp á sama stiga tal sum Havørnin, og jf. § 46, stk. 2 vóru framman fyri í síðsta FM róðrinum", sum Dómsnevndin leggur til grund í síni avgerð.

Við hesum staðfestir Ítróttadómstólurin úrskurðin hjá Dómsnevndini.

**Úrskurður**

Grundað á frammanfyri standandi ger Ítróttadómstólurin av at staðfesta úrskurðin hjá Dómsnevnd Róðrarsambands Føroya.

Tórshavn 15. oktober 2025

Anna Rein | Jóhan Lamhauge | Magnus Dam

Sissal K. Kristiansen | Heðin Joensen